## Møtirøð í Fuglafirði

Um vikuskiftið skipar missiónshúsið Thabor fyri møtirøð í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Talari hesi kvøldini í Mentanarhúsinum verður Heri Elttør. Heri er 40 ára gamal og ættaður úr Klaksvík. Hann er giftur við danskari konu, og saman eiga tey trý børn. Heri hevur verið trúboðari í Føroyum, men starvast nú sum trúboðari í Danmark bæði millum danir og føroyingar í Danmark. Heri hevur av og á verið í Føroyum og talað á størri tiltøkum kring landið.

Møtini í Mentanarhúsinum vera fríggjakvøld, leygarkvøld og sunnukvøld kl. 19. Taborkórið á Toftum, ungdómskór úr Vágum og streingjakórið úr KFUM & K í Klaksvík koma at syngja.

## Nýggi leiðarin tekur við

Hans Petur í Brekkunum tók í gjár við leiðarastarvinum í Føroyahúsinum í Keypmannhavn, og longu frá fyrsta nóta er nógvur aktivitetur í húsinum. Leygarkvøldið verður stórur dansur við sera vælumtókta bólkinum All That Rain, og nýggi leiðarin væntar at nógv fólk støkka inn á gólvið og fáa sær ein svingom til henda "creme del a creme" tónleikin. Sunnudagin hevur Frits Johannesen fernisering. Myndamálið er úr hugaheimi hansara – musiskar løtur og annað. Kristina Joensen og Jógvan Joensen spæla og syngja.

# Lisbeth: – Smáligt av Tobba

**Lisbeth L. Petersen kallar tað smáligt, tá Tórbjørn Jacobsen er ímóti, at danskt mál og hervald skulu tryggjast í nýggju kirkjulógunum**

POLITIKKUR
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

– Hatta er smáligt av Tórbjørn, og tað sær næstan út sum, at man skal vísa partíkort fram, tá hann verður prestur og skal prædika.

– Tað er ikki so løgið, at vit eru í tveimum ymiskum flokkum.

Tað sigur Lisbeth L. Petersen, løgtingslimur fyri Sambandsflokkin, um samrøðuna við Tórbjørn Jacobsen, tjóðveldistingmann, í Sosialinum í gjár. Hon er limur í politiska fylgibólkinum í sambandi við ta ætlaðu yvirtøkuna av Fólkakirkjuni.



*Lisbeth L. Petersen er limur í politiska fylgibólkinum í sambandi við ta ætlaðu yvirtøkuna av Fólkakirkjuni*

Tórbjørn Jacobsen segði m.a., at føroyskt eigur at vera høvuðsmálið í yvirtiknu kirkjuni, og at møguligir danskir prestar skulu prædika á føroyskum. Harafturat fanst hann hvassliga at greinini í lógaruppskotinum um ta yvirtiknu kirkjuna, ið umrøður donsku hernaðarligu verjuna. Tórbjørn Jacobsen eftirlýsti eisini eitt kjak um yvirtøkuna, tí hann metti, at politikararnir hava gjørt yvirtøkuna til eitt tabu.

Lisbeth L. Petersen metir, at danskir prestar kunnu læra seg at tosa føroyskt. Men hon heldur ikki, tað eigur at verða eitt krav.

– Kunnu teir tað er tað í fínasta lagi, men vit hava havt trupult við at fáa føroyskar prestar, vísir sambandskvinnan á.

– Eg virði føroyska málið, men viðhvørt kann tað vera tungt at lurta eftir, tá teir tvinga seg at tosa føroyskt, heldur Lisbeth L. Petersen, sum minnir á, at føroyskt er høvuðsmálið í Føroyum, og at danskt ikki er so nógv brúkt longur, sum tað var áður.

### Viðgjørt í trúnaði

Spurd, um hon er samd við Tórbjørn Jacobsnen, tá hann vil vera við, at politikararnir hava gjørt yvirtøkuna av kirkjuna til tabu, er Lisbeth L. Petersen partvíst samd.

– Tað varð álagt okkum í fylgibólkinum, at alt var í trúnaði, sigur tingkvinnan, og heldur hetta helst koma av, at yvirtøkan ikki skuldi brúkast í einum møguligum valstríði.

— Men tað ger Tórbjørn, nú hann hevur opnað ballið, sigur Lisbeth L. Petersen um sjónarmiðini hjá tjóðveldismanninum. Hon heldur tó, at málið um yvirtøkuna kanska kundi verið meira opið, og at tað í løtuni tykist sum um, at tað er "forhastað", sum hon málber seg.

– Tað er ymist, vit kundu hugsað okkum at vitað meira.

Lisbeth L. Petersen heldur ikki nógv um kravið Tórbjørn Jacobsen um, at danskt hervald ikki skal vera nevnt í føroyskum kirkjulógum.

– Gloymir hann, at vit eru í ríkisfelagsskapi, sigur Lisbeth L. Petersen.

# Ber neyvan til at seta føroyskt oman fyri danskt

**Í heimastýrislógini stendur, at danskt kann nýtast í øllum almennum viðurskiftum. Tí ber neyvan til at krevja, at danskir presta skulu prædika á føroyskum, tá hon er yvirtikin, metir Sjúrður Rasmussen. Bergur Berg, sum hevur verið til at orða lógaruppskotini til ta yvirtiknu kirkjuna, heldur, at kanska hevði orðingin »annað mál« verið hepnari enn »fremmant mál«**

FÓLKAKIRKJAN
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Í uppskotinum til løgtingslóg um at brúka kirkju og um limaskap í Fólkakirkjuni, stendur, at bispur kann loyva, at fremmant mál verður brúkt við guðstænastur.

Í viðmerkingunum til greinina stendur m.a., at »*Eftir grein 11 í heimastýrislógini ber eins væl til at nýta danskt sum føroyskt í øllum almennum viðurskiftum. Ásetingin er tí viðkomandi, tá ætlanin er at hava gudstænastu ella part av henni á øðrum máli enn føroyskum ella donskum*«.

Hetta er fallið Tórbjørn Jacobsen, tjóðveldistingmanni, fyri bróstið. Í samrøðu við Sosialin í gjár, bar hann fram, at føroyskt átti at vera omanfyri onnnur mál í eini yvirtiknari føroyskari kirkju. Eisini setti hann spurnartekn við hvør ráddi fyri borgum í hesum spurninginum, danskir ella føroyskir myndugleikar. Hann segði seg tí einki hava ímóti donskum máli í kirkjuni, men at loyvi skal gevast til hetta eins og við øðrum málum enn føroyskum.

Tað tykist tó, sum tað verður trupult hjá Tórbjørn Jacobsen at fáa síni krøv gjøgnumførd, so leingi heimastýrislógin er galdandi.

Sjúrður Rasmussen, løgfrøðingur og ráðgevi á Løgmansskrivstovuni, metir, at hetta kann samanberast við orðaskiftið á Tingi í 1986, tá spurningurin um rættargangslógina § 149 stk 1 um málið í rættinum varð viðgjørdur.

Sjúrður Rasmussen skrivaði tá eitt drúgt responsum, har hann grundgav fyri, at greinin í heimastýrislógini um, at »*Føroyskt verður viðurkent sum høvuðsmál, men danskt skal lærast væl og virðiliga, og danskt kann eins væl og føroyskt nýtast í almennum viðurskiftum*« mátti skiljast sum ein minnilutaverja hjá dønum í Føroyum, og at tað tí var í lagi at § 149 stk. 1 var orðað soleiðis, at málið við sorinskrivaraembætið var føroyskt, men at danskt kundi brúkast av dønum. Forsætismálaráðið kolldømdi tó hesa tulking. Endin var, at § 149 stk. 1 varð orðað soleiðis, at hon endurtók heimastýrislógina, so at greinin kom at ljóða »*Hovedsproget i retten er færøsk, men dansk kan lige så vel anvendes som færøsk*«.

Sostatt kann danskt helst nýtast eins væl og føroyskt í føroysku kirkjuni, og tí er spurningurin, um tað ber til at noyða danskar prestar í Føroyum at prædika á føroyskum.

### Ikki neyðugt at alt er liðugt fyri ólavsøku

Bergur Berger fulltrúi á Mentamálaráðnum og hevur verið við til at orða lógaruppskotini um hvussu tann yvirtikna kirkjan. Hann viðgongur, at orðingin »*fremmant mál*« í lógaruppskotinum kanska er eitt sindur keðilig, og at »*annað mál*« kundi verið ein onnur loysn.

Fulltrúin vísir á, at eitt av endamálunum við lutherska siðaskiftinum var, at boðanin í kirkjuni skuldi fara fram á móðurmálinum.

– Men í Føroyum er tað serliga galdandi, at her í Føroyum er heimastýrislógin galdandi, sum eingin onnur lóg kann broyta uppá, sigur Bergur Berg.

Tilsamans er ætlanin, at 7 lógir skulu gerast í sambandi við yvirtøkuna. Tvær teirra verða helst samtyktar, eftir at kirkjan væntandi er yvirtikin á ólavsøku. Tó er ikki vist, um tíðarætlanin fer at halda.

– Vit eru væl inni í evninum embætisliga, so tað gongur skjótt. Men nu tikkar klokkan alvorliga, staðfestir Bergur Berg.

Um kirkjan skal yvirtakast á ólavsøku, skulu lógaruppskotini helst viðgerast á Tingi í vár. Hinvegin er yvirtøkan ikki í vanda, tí ikki er neyðugt, at alllar lógirnar verða samtyktar undan yvirtøkuni, staðfestir Bergur Berg.

### Prestarnir framvegis tænastumenn

Í sambandi við yvirtøkuna hevur verið fýlst eitt sindur á, hvussu trúarjáttaninin hjá kirkjuni kann tryggjast. Í Danmark er hetta nevnt í grundlógini, sum eisini er galdandi fyri Føroyar. Bergur Berg vísir á, at tey ikki hava viðgjørt, hvussu ein møgulig broyting av trúarjáttanum kann fremjast, og at hetta neyvan heldur verður viðgjørt.

Hann vísir á, at Norska Lóg frá 1688 ásetir, at m.a. Augsburska trúarjáttanini og tey sonevndu »symbolini« eru grundarlag fyri læru kirkjunnar, og at til ber at kjakast, um Norska lóg hevur konstitutionellan týdning.

Danska grundlógin er nevniliga grundfest í Donsku lóg, ið svarar til Norsku lóg, vísir Bergur Berg á.

Núverandi samgonga er tann triðja í røðini, sum hevur sett sær fyri at yvirtaka Fólkakirkjuna, men enn er sum kunnugt ikki komið á mál. Í hesum sambandi hevur eitt sindur verið tosað um, hvussu setanarviðurskiftini hjá prestunum skulu vera í framtíðini. M.a. hevur áður verið sagt úr Mentamálaráðnum, at prestarnir skuldu vera sáttmálasettir. Men sambært Bergi Berg skal so lítið sum gjørligt broytast í Fólkakirkjuni, og tí halda prestarnir helst fram við at vera tænastumenn.

**FAKTA**

**§ 11.** Føroyskt verður viðurkent sum høvuðsmál, men danskt skal lærast væl og virðiliga, og danskt kann eins væl og føroyskt nýtast í almennum viðurskiftum